# Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

Dagfesting: 08-03-2024

**Uppskot til**

## Kunngerð um broyting í kunngerð um vernd av ungfiski og hámark fyri íblanding av ungfiski

(Upsi, toskur og hýsa fevnd av skylduni at flyta øki, um íblandingin av ungfiski er ov høg)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 118 frá 20. juli 2021 um vernd av ungfiski og hámark fyri íblanding av ungfiski verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Inngangurin verður orðaður soleiðis:
“Við heimild í § 25, stk. 4, § 34, stk. 1, nr. 2 og § 64, stk. 2 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020, løgtingslóg nr. 185 frá 18. desember 2020, løgtingslóg nr. 170 frá 21. desember 2021 og løgtingslóg nr. 155 frá 20. desember 2023, verður ásett:”

**2.** § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:

“Er íblandingin av ungfiski, sambært § 2, stk. 1, størri enn tað hámark, ið ásett er sambært § 2, stk. 2, skal skiparin beinanvegin boða Vørn frá umvegis fráboðanarskipanina á heimasíðuni www.vorn.fo.”

**3.** § 3, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2.* Er íblandingin av ungfiski av ávikavist upsa, toski ella hýsu størri enn tað hámark, ið ásett er sambært § 2, stk. 2, skal fiskifarið alt fyri eitt gevast at fiska í økinum, og fiskifarið skal flyta í minsta lagi 5 fjórðingar frá eini og hvørjari knattstøðu á tóvinum næstu 72 tímarnar.”

**4.** Í § 3 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:
“*Stk. 3.* Er íblandingin av ungfiski av ávikavist svartkjafti, sild ella makreli størri enn tað hámark, ið ásett er sambært § 2, stk. 2, skal fiskifarið alt fyri eitt gevast at fiska í økinum, og skal fiskifarið flyta í minsta lagi 10 fjórðingar frá eini og hvørjari knattstøðu á tóvinum næstu 72 tímarnar.”
Stk. 2 verður eftir hetta stk. 4.

**5.** Yvirskriftin yvir § 4 verður strikað.

**6.** § 4 verður strikað.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, dagfesting

**Dennis Holm**
landsstýrismaður

/ Elin Mortensen